# Jólakonsert við VOX


*VOX hevur roynt mangt og hvat, m.a. at sungið saman við Ettu Cameron*

Jólini nærkast og nógv jólatiltøk eru at fara til. Fríðrikskirkjan verður 18. des. karmur um árligu jólakonsertina hjá VOX. Hetta er sætta árið á rað, at VOX skipar fyri jólakonsert. Hvørt ár hevur henda konsertin savnað nógv fólk til eina hugnaliga løtu frammanundan jólum við góðum jólasangi.

Fyri at gera konsertina meira fjølbroytta er ein gestakórleiðari boðin við. Tað er tann navnframi Ólavur Jøkladal, sum fer at seta klassiskan dám á konsertina við verkum eftir m.a. Mendelssohn og Hans Leo Hasler. Dagligi kórleiðarin, Ásbjørn Berthelsen, fer at taka sær av tí meira traditionella partinum av konsertini.

Umframt gestakórleiðara verður eisini gestasangari á konsertini.

Lagið "Tú lyftir meg" hjá Essa Jacobsen saman við VOX hevur seinastu tíðina verið nógv at hoyra, og á konsertini fer Essa saman við kórinum fyri fyrstu ferð at framføra lagið "live".

VOX er mannað við ungum sangarum úr Heimamissiónini.

Konsertin verður í Fríðrikskirkjuni sunnudagin 18. desember klokkan 16.

